# Jákup bíðar eftir møguleikanum

**Hóast hann fekk vánaligt skoðsmál næstseinast, so var svenski Eddie Gustafosson aftur millum stólparnar, tá Molde hevði vitjan av Lillestrøm**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tað er ikki serliga hugaligt hjá Jákupi Mikkelsen í løtuni. Hann sleppur framvegis ikki upp í part á besta liðnum hjá Molde. Hann var á beinkinum leygarkvøldið, tá Molde í sjónvarpaða dystinum hevði vitjan av Lillestrøm, og um Eddie Gustafsson ikki verður skaddur, so sleppur Jákup neyvan á liðið í næsta dystinum. Hesa ferð helt svenski málmaðurin tætt – dysturin endaði málleysur.

Tað var mett at vera ein møguleiki fyri, at Jákup fór at fáa møguleikan leygarkvøldið, tí málverjin hevði fingið vánaligt skoðsmál í undanfarna umfarinum, men venjarin valdi at geva honum ein møguleika afturat.

Åge Hareide, sum fyri stuttum fór úr venjarastarvinum í Brøndby, hevur áður verið venjari hjá Molde. Hann verður eftir ársskiftið venjari hjá Rosenborg. Leygarkvøldið var hann í Molde, og hann var eirindarleysur í sínum kritikki. Hann helt, at spælararnir kundu ikki bjóða áskoðarunum sovornan ballón fótbólt. Málverjararnir báðir sendu næstan bóltarnar ímillum sín, og tað var næstan lagt upp til, at eitt net varð spent á miðjum vølli, helt Åge Hareide, sum helt seg síggja, at liðini vóru so bangin fyri at tapa, at tey ikki tordu at spæla fyri at vinna.

Molde hevði ongan málmøguleika undan steðginum. Í øðrum hálveiki høvdu teir tveir stórar møguleikar, men Lillestrøm málverjin, sum gjørdist dagsins maður, bjargaði.

### Rosenborg tapti aftur

Triði málverjin hjá Molde eitur Knut Lillebakk. Hann er í løtuni útleigaður til Bryne. Sunnudagin var hann í málinum, tá tíggju faldaðu meistararnir úr Rosenborg komu at vitja. Og tað var vorðið sum avrik maðurin, sum verður mettur at standa aftanfyri Jákup Mikkelsen útinnti. Hann bjargaði brotssparki, sum var dømt, tí Harald Brattbakk, fyrrverandi liðfelagin hjá Toda Jónsson, skuldi vera feldur.

Norski fótbóltsheimurin var skelkaður av, at Bryne vann 2–1. Tað var ikki fyrrenn síðstu løtuna, at Rosenborg minkaði um munin.

Bodø/Glimt hevði undan sunnudegnum verið ósigrað oddalið. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Brann úr Bergen, sum ongan dystin hevði vunnið. Tí var heimaliðið mett sum greiður favorittur, men gestirnir fóru við øllum. Brann vann 1–0.

Start úr Kristinsand hevði vitjan av Viking Stavanger. Dysturin endaði 1–1, og teir á heimaliðnum vóru hepnir at fáa stig. Hetta var fjórða ferðin, at Start spældi javnt, og Benny Lennartsson, sum í síni tíð var venjari hjá Toda Jónsson og Lyngby og sum nú er venjari í Viking, var ikki serliga væl nøgdur við úrtøkuna.

Lyn úr Oslo var og vitjaði Moss. Gestirnir vunnu 2–0. Fyrra málið skoraði verjuspælarin Steven Lustü. Hann var miðverji í Herfølge, tá Jákup Mikkelsen var málverji og teir vunnu danska meistaraskapin.

Fyrrverandi føroyska felagið Sogndal var á útivølli ímóti Stabæk, sum vann 4–0. Håvard Flo, sum í fjør troðkaði Kurt Mørkøre av liðnum, hevði fleiri møguleikar at skora, men tað var so eiðasørt, at tað eydnaðist.

Hjá Vålerenge, sum flutti upp í bestu deildina í fjør, gongur tað sum eftir ánni. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Odd Greenland, og liðið úr Skien varð sent til hús við 2–0 tapi. Gamli landsliðsmaðurin, Kjetil Rekdal, er venjari hjá Vålerenge, og tað verður mett ikki at vera ómøguligt, at teir skulu gera galdandi í toppinum.

Fyribils gleðast teir um hvørt stigið teir fáa. Málið hjá venjaranum og felagnum er í fyrstu atløgu at sleppa undan at flyta niður aftur.

# Karpov sum í gomlum døgum

**Fyrrverandi heimsmeistarin Anatoly Karpov leikti seg sera óvæntað í finaluna í sterkastu kvikkapping nakrantíð, nevnd Eurotel Knock-out, sum varð telvað í Prag**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Øll heimselitan, undantikið Ruslan Ponomariov, varð savnað herfyri í Prag við tveimum endamálum í huganum. Fyrst og fremst sjálvsagt fyri at telva, men eisini fyri at royna at loysa talvpolitisk mál. Talvheimurin er nevnliga tvíbýttur, við talvsamgonguni FIDE á einari síðu og Garry Kasparov við fleiri á hinari, umframt at vanlig nærtalv verða leikt við ymsum tíðum, tann sokallaða FIDE-tíðin, sum er stutt talv í mun til tey vanligu klassisku langtalvini.

Roynt varð mánadagin 6. mai at loysa trupulleikarnar í týðandi fundi millum partarnar. Vónandi spurdist okkurt burturúr.

### Ivanchuk vann meistaran

Í kvartfinaluni í sjálvari kappingini hendi nakað sera óvæntað. Vassily Ivanchuk vann nevnliga á Garry Kasparov, eftir at bæði kviktalvini eins og bæði snartalvini (snartalv blivu leikt í umdystum) endaðu jøvn. Ivanchuk vann sudden-death snartalvi. Framanundan hevði Karpov framt eina enn stóra sensatión, tá hann vann fyrsta kviktalvið móti Vladimir Kramnik, og leikti seinna javnt. Karpov vann eisini á Morozevich og Shirov, sum gav honum pláss í finaluni.

Indarin Anand bleiv tó banamaður Karpovs í finaluni, tá hann vann 1,5 - 0,5 móti Karpov. Í finaluni blivu tvey langtalv telvd ístaðin fyri kviktalvini á 25. min. hvør. Anand telvaði eins og Karpov trygt og væl, og tapti einki talv í kappingini. Í hálvfinaluni mátti hann stríðast væl fyri at vinna á føroyavininum Ivan Sokolov, sum óvæntað hevði leikt seg í hálvfinaluna, við at eitt nú vinna á Peter Leko og Michael Adams.

Men eingin ivi var um at stjørnan í kappingini var Karpov. Hann telvaði sum í gomlum døgum, og tapti ei heldur nakað talv fyrrenn í finaluni.

### Atlantic Weekend

Umleið 50 telvarar hava teknað seg til 2nd Atlantic Weekend, sum Arild Rimestad úr Talvfelagnum Føroyar skipar fyri í Keypmannahavn. Eini fimm tittultelvarar verða við, eitt nú GM Carsten Høi úr Danmark, og eisini eru nógvir útlendingar at finna á luttakaralistanum.

Føroyingar eru sjálvsagt eisini við. Útisetarnir John Arni Nilssen, Heini Olsen, Eyðun Nolsøe og Finnbjørn Vang eru við, og úr Føroyum fara Hans Kristian Simonsen, Ólavur Simonsen, Rani Nolsøe og Martin Poulsen til Keypmannahavnar at vísa útisetunum hvat teir duga.

Kappingin verður í døgunum 8-12. mai, har heili níggju talv skulu telvast uppá fimm dagar. Hetta merkir at fýra av døgunum verða tvey talv telvd um dagin. Tungt, men eisini avbjóðandi verður tað fyri telvarnar. Á www.ksu.dk verður møguligt at fylgja við.

### Talvið hesa vikuna

***Karpov,A (2690) – Kramnik,V (2809)***
*Eurotel Trophy Prague CZE (2.2), 30.04.2002*

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Rif3 b6 4.g3 Ba6 5.b3 Bb4+ 6.Bd2 Be7 7.Bg2 c6 8.Bc3 d5 9.Ribd2 Ribd7 10.0-0 0-0 11.Re1 c5 12.e4 dxe4 13.Rixe4 Bb7 14.Rifg5 cxd4 15.Bxd4 Rixe4 16.Rixe4 Fc7 17.Ric3 Rad8 18.Rid5 Bxd5 19.cxd5 e5 20.Rc1 Fb8 21.Bb2 Bc5 22.a3 a5 23.Rc4 f5 24.b4 axb4 25.axb4 Bd6 26.Fd2 e4 27.Rc6 Rde8 28.Bd4 Rie5 29.Rxb6 Fd8 30.Rxd6 Fxd6 31.Bc5 Fd7 32.Bxf8 Rxf8 33.Fd4 Fd6 34.b5 Rb8 35.Rb1 Rb6 36.h3 h6 37.g4 fxg4 38.Fxe4 gxh3 39.Bxh3 Rb8 40.Be6+ Kh8 41.b6 Rid7 42.Bxd7 Fxd7 43.Fe6 Fb7 DIAGRAM (Støðan er vunnin, og Karpov finnur rætta og skjótasta veg til sigurs) 44.Rc1! Fa6 [44...Fxb6? 45.Rc8+ Kh7 46.Fg8+ Kg6 47.Rxb8] 45.Rc6 Rf8 46.Fe7 Rg8 47.b7 Fb5 48.Rc8 Fb1+ 49.Kh2 Fb2 50.Kg2 Fb4 51.Fxb4 1-0 Áðrenn 44.Rc1!

## Úrslit frá ár 2002

**F. M. 1/2 Marathon í Havn 4,5, 2000 menn.**

**Menn**

| Pláss | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/Staður | t. | min. | sek. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Cecil | Weihe | 1965 | Bragdið | 1 | 16 | 55 |
| 2 | Sámal H. | Debes | 1952 | Bragdið | 1 | 19 | 35 |
| 3 | Sigurð | Justinussen | 1967 | Bragdið | 1 | 21 | 37 |
| 4 | Bogi | Joensen | 1973 | Treysti | 1 | 21 | 43 |
| 5 | Jonhard | Larsen | 1973 | Treysti | 1 | 24 | 5 |
| 6 | Sam | Vang | 1970 | Oyrabakki | 1 | 24 | 8 |
| 7 | Gunnar | Dahl-Olsen | 1965 | Tórshavn | 1 | 30 | 22 |
| 8 | Djóni | Ziska | 1965 | Hóyvík | 1 | 31 | 33 |
| 9 | Johan Pauli | Johansen | 1972 | Tórshavn | 1 | 33 | 15 |
| 10 | Jósvein Herup | Olsen | 1958 | Tórshavn | 1 | 34 | 36 |
| 11 | Regin I | Jakoben | 1963 | Tórshavn | 1 | 35 | 15 |
| 12 | Ólavur Herup | Olsen | 1943 | Tórshavn | 1 | 35 | 36 |
| 13 | Birgir | Sondum | 1961 | Bragdið | 1 | 36 | 12 |
| 14 | Harry | Hansen | 1938 | Roysnið | 1 | 38 | 28 |
| 15 | Høgni | Vilhelmsen | 1976 | Tórshavn | 1 | 40 | 0 |
| 16 | Steintór | Hjaltalin | 1949 | Tórshavn | 1 | 40 | 36 |
| 17 | Sverri Mohr | Edvinson | 1965 | Tórshavn | 1 | 41 | 52 |
| 18 | Henning | Poulsen | 1951 | Tórshavn | 1 | 43 | 33 |
| 19 | Óla Jákup | Kristoffersen | 1959 | Tórshavn | 1 | 48 | 33 |
| 20 | Jákup Alberg | Berg | 1963 | Tórshavn | 1 | 50 | 4 |
| 21 | Ib | Skovborg | 1961 | Tórshavn | 1 | 53 | 15 |
| 22 | Regin | Jóanesarson | 1945 | Vestmanna | 2 | 1 | 3 |

**Kvinnur**

| Pláss | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/Staður | t. | min. | sek. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rigmor N. | Arge | 1969 | Bragdið | 1 | 29 | 37 |




Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

**Bilur til sølu**

Við hesum verður ein bilur av slagnum Opel Record lýstur til sølu. Bilurin stendur í Vági.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til undirritaðu.

**ADVOKATSKRIVSTOVAN**
Fr. Petersensgøta 9 • 100 Tórshavn • tlf 311145
**att: Fríða Patursson, adv.**





**Taljur Stroppar Trýst-slangur Spuli-slangur**

**Tórshavnar Maskinhandil**
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29 - 30
100 Tórshavn - Tlf. 313442



**Mjørkadal Idrætsforening**
afholder

**FÆRØ MARCH**
**9. mai (Kr. Himmelfartsdag)**
**kl. 1200**

Da vi på grund af vejret aflyste marchen St. Bededag, vil vi i stedet gennemføre arrangementet Kr. Himmelfartsdag. Det er i år 25. gang marchen afholdes, det vil vi gerne markere med præmier til alle, der gennemfører marchen. Undervejs vil der være mulighed for køb af forfriskninger. Sideløbende med marchen, vil der som noget nyt blive afholdt MIF Halvmarathon. Der vil være 2 væskedepoter på ruten. Der er mulighed for transport fra Mjørkadal og til Tórshavn

Startsted: FK-HOYVIK
Ruten: FK/Hoyvik - Vegurin Langi - Sundsvegurin - Norðari Ringvegur - Oyggjarvegur Húsareyn - Mjørkadal. i alt 15 km
Løberuten: FK - Hvítanesvegur - Ringvegur - Yviri við Strond - J. Broncksgøta - Hoyvíksvegur - Ringvegur - R.C. Effersøesgøta - Gundadalsvegur - Áargeil - Ringvegur - Oyggjarvegur - Mjørkadal, i alt 21,1 km
Startgebyr: Det er gratis at deltage. Ingen tilmelding.
Præmie: Der er præmie + diplom til alle der gennemfører.
Info: 34 14 20 - Ib Skoubo

Vel mødt, MIF



Útbjóðing

**Reingerð á Farstøðini**

Við hesum verður reingerðin av Farstøðini hjá Strandfaraskipum Landsins, Eystara Bryggja, boðin út.

**Uppgávurnar fevna um**
Á Farstøðini er talan um 2 hæddir og hølir sum skrivstovur, toilettir, gangir, onnur smáhølir og trappuuppgongd.
Nærri avtala verður gjørd um uppgávur og treytir, herundir arbeiðstíðir.

**Førleikakrøv**
Vit vænta at umsøkjarar lúka fylgjandi høvuðskrøv:
• Hava viðkomandi royndir
• Eru álítandi

**Tilboð**
Tilboð, ið eru gjørd út frá avtalu um uppgávurnar, skulu stílast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 17. mai 2002

Áhugað verða vinarliga biðin um at seta seg í samband við Regin Vágadal, ferðslusamskipara, tlf. 34 30 00 ella e-post: rev@ssl.fo fyri at fáa nærri at vita um uppgávurnar.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum/ -Samskiftisdeildini.

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.



Toll- og Skattstova Føroya

**Størv sum grannskoðarar**

**Vegna ov fáar umsóknir verður søkt av nýggjum**

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, eru trý størv leys at søkja til setan so skjótt til ber. Eitt fast starv fulla tíð, eitt fast starv hálva tíð og eitt starv sum avloysari í 1 ár fulla tíð.

Øll størvini eru á Eftirlits- og innheintingardeildini. Høvuðsuppgávurnar eru eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt og toll, herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv**
Tey, sum sett verða í fulltíðarstørvini, skulu hava roknskaparligan førleika, so sum cand. merc., HA, HD ella líknandi útbúgving.

Tann, sum settur verður í hálvtíðarstarvið skal hava roknskaparligan førleika, so sum merkonom ella líknandi útbúgving.

Harumframt skulu nýggju fólkini vera fyrikomandi og arbeiðssom og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v. ø. o. trý sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum er treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar øki, men fevnir annars um Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí, og tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Hallbjørg Hansen á tlf. 310260, lok. 108.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**22. mai 2002**

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skudarinnkreving hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Streymoyar øki starvast 60 fólk. Høvuðsskrivstovan, har viðkomandi koma at starvast, er á Smyrilsvegi, Posttollurin heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

*Heimasíða: www.tollskatt.fo*

*E-mail: streymoy@tollskatt.fo*



Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo



**Maður til flisa- og urtagarðsarbeiði**

Søkt verður eftir einum manni í summar. Arbeiðið umfatar flisa- og annað urtagarðsarbeiði. Koyrikort krevst.

Skriftlig umsókn ynskist!

**Búgvi Róin**
Fløtugerði 14
530 Fuglafjørður
Fax 445042